Støðan óforsvarlig

- Tá ið annar av kommunulæknunum berst frá at vera til arbeiðis, er støðan ikki forsvarlig, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klakvík um kommunulæknatrotið í Norðoyggjum

LÆKNATROT
Turið Kjølbro

Læknatrotið í Norðoyggjum heldur fram. Støðan er hampuligt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, skilst, men kommunulæknarnir, sum eiga at vera fýra í tali, eru framvegis bert tveir. Hesir hava ábyrgdina av fólkaheilsuni hjá teimum gott og væl 6000 íbúgvunum í Norðoyggjum. Spurningurin er so um støðan er forsvarlig.

- Tá ið annar av kommunulæknunum berst frá at vera til arbeiðis, er støðan ikki forsvarlig, og tað kann jú koma fyri vegna sjúku ella feriu, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klakvík.

Kommunulæknarnir hava skyldu til at vitja útoyggjarnar regluliga, men sum er hava settu kommunulæknarnir ongan møguleika at røkja hesa tænastuna. Ístaðin mugu útoyggjafólk koma langa leið til Klaksvíkar til lækna. Og tað kann sum skilst taka drúgva tíð, frá tí tú biður um tíð hjá lækna til tú sleppur framat.

- Vit kenna okkum rættiliga hjálparleys, tí vit fáa ikki gjørt so nógv. Kommunulæknarnir eru ovbyrjaðir, hava ein alt ov langan arbeiðsdag og skulu vera tøkir nærum alt døgnið. Spurningurin er, hvussu leingi teir halda til tað, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

Almanna- og heilsumálastýrið søkir javnan eftir læknum til ósett støvr í Føroyum, men fá søkja.

- Vit hava onkuntíð avloysarar í styttri tíðarskeið fyri annan av kommunulæknunum. Tað er als ikki nøktandi at so stór útskifting er, tí hesir hava ongan møguleika at kenna viðskiftafólkini. Eisini eru viðhvørt eldri kommunulæknar, sum eru farnir frá, í Klaksvík fyri at lætta um, men tað er sjáldan.

Karmarnir hjá kommunulæknunum í Klaksvík eru annars góðir. Íbúðir eru til taks og arbeiðshølini nøktandi. Og um tvey ár stendur ein nýggj heilsumiðstøð liðug til hesar at húsast í.

- Vit hava arbeitt miðvíst við at bøta um arbeiðsviðurskiftini hjá kommunulæknunum. Læknatrotið botnar ikki í arbeiðskorunum, tað er alla staðni, eisini uttanlands, sigur Steinbjørn O. Jacobsen.

- Vit kenna okkum rættiliga hjálparleys, tí vit fáa ikki gjørt so nógv, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri sonur, beiggi og mammubeiggi okkara

Eiler Sonni Danielsen

føddur 6. januar 1974 - deyður 8. oktober 2001
fer til gravar úr Havnar Kirkju
mánadagin 22. oktober kl. 13.00

Familjunar vegna
Sofía, Bjarni, Beinta og Mariann

Tey, ið ynskja at minnast Eiler við blómum ella kransum, kunnu í staðin geva Barnabata eina gávu á konto í føroysku peningastovnunum.

Tøkk

Hjartans tøkk veita vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður mín, og kæri pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi okkara

Karsten Elias Hansen
Klaksvík

var sjúkur, doyði og og varð jarðaður. Tøkk fyri umsorgan á so ymiskan hátt. Ein serlig tøkk verður veitt starvsfólkunum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og heimasjúkrasystrunum, sum vóru so væl um hann. Tøkk fyri vitjanir, uppringingar, brøv, fjarrit, blómur, troystarrík orð og vøkur minningarorð. Tøkk til tykkum, sum fylgdu og hjálptu til í sambandi við jarðarferðina.

Familjunnar vegna
Ragnhild, Hanus, Jóannes og Finngerð

Brandskúlin nýggjan stjóra

Justinus Leivsson Eidesgaard

50 ára gamli Signheðin Davidsen, ættaður úr Nesvík, búsitandi í Hósvík, hevur tikið við starvi sum nýggjur stjóri á Føroya Brandskúla. Hann er ikki nýggjur á skúlanum, hevur starvast har síðan 1985. Hann hevur tikist við viðlíkahald og hevur eisini undirvíst.

Tað er serliga siglandi fólk, maskinmeistarar og navigatørar, sum nýta skúlan.

Í samband við at nýggjur er settur er móttøka á Føroya Brandskúla mánadagin klokkan 15 og har eru sjálvsagt øll við áhuga fyri eldi og bæsan av hesum væl komin.

Jóni, Hans Jákup og Kristine taka við

Tríggir nýggir deildarleiðarar eru settir í Føroya Sparikassa

STØRV
Turið Kjølbro

Fyri stuttum vórðu ikki færri enn tríggir nýggir deildarleiðarar settir í starv í Føroya Sparikassa. Í deildini í Vestmanna er nýggi deildarleiðarin Jóni Mohr Olsen, sum hevur drúgvar royndir innan peningastovnsarbeiði, umframt at hann eisini hevur starvast sum fíggjarleiðari í Holsteinsborg kommunu í Grønlandi í fleiri ár. Jóni er 45 ára gamal og ættaður av Sandi. Fráfarandi deildarleiðarin, Ásla Friis, hevur júst havt sín 25 ára starvsdag í Føroya Sparikassa. Aftaná 15 ár sum deildarleiðari hevur hon nú ynskt, at nýggjar kreftir loysa av. Hon heldur fram sum privatkundaráðgevi á deildini í Vestmanna.

Við Norðskála er Hans Jákup Johansen settur sum deildarleiðari. Hans Jákup er 26 ára gamal og ættaður úr Haldarsvík. Hans Jákup hevur starvast sum privatkundaráðgevi í Tórshavn, eitt skifti hevur hann starvast á Grannskoðanardeild Sparikassans, og seinastu árini hevur hann verið vinnulívsráðgevi á Vinnulívsdeildini í Tórshavn. Hans Jákup hevur tikið fíggjarskúla og fíggjarliga víðariútbúgving. Hann er nú í gongd við fíggjarakademilestur á bachelorstøði. So hóast sín unga aldur er hann ein maður við drúgvum royndum í Sparikassanum, bæði yrkisliga og hvat útbúgving viðvíkir, sum fær ábyrgdina av viðskiftafólkunum á deildini við Norðskála.

Undan honum var Arnfinn Langgaard deildarleiðari við Norðskála. Hann hevur ynskt nýggjar avbjóðingar, nú Sparikassin hevur stovnað vinnulívsdeild á deildini í Runavík, og hevur tikið við sum vinnukundaráðgevi har.

Í Fuglafirði er Kristine Ellingsgaard sett sum deildarleiðari. Kristine hevur í fleiri ár starvast sum kundaráðgevi á deildini í Fuglafirði. Eitt skifti hevur hon starvast á Kredittdeildini í Tórshavn. Hon er útbúgvin í Sparikassanum, og hevur fíggjarskúla og víðari útbúgving innan fígging. Kristine er 34 ára gomul og ættað úr Gøtu.

Fyrrverandi deildarleiðarin, Sigmar Davidsen, tók fyrr í ár við avbjóðingum í aðrari fyritøku.

Føroya Sparikassi markerar starvssetanirnar við móttøkum á nevndu deildum.

Føroyskar kvinnur raskast at eiga børn

Føroyskar kvinnur eiga væl fleiri børn enn kvinnur í londunum rundanum okkum

HAGTØL
Turið Kjølbro

Kvinnur í Norðurlondum eiga fleiri børn enn kvinnur í ES-londum. Og meiri enn helmingurin av børnunum, sum eru fødd í Norðurlondum, eiga kvinnur, sum eru eldri enn 30 ár. Norðurlendskar kvinnur eru tískil óføra at eiga børn, men gamlar, tá ið tær byrja. Hetta stendur at lesa í Nordisk Statistisk Årbok 2001, sum er árbók um okkara gerandisdag.

Tølini vísa, at væntað verður, at norðurlendskar kvinnur í føðialdri eiga fleiri børn enn kvinnur í ES-londum. Burtursæð frá Álandi liggja øll Norðurlond og sjálvstýrandi økini omanfyri miðaltalið fyri ES-lond í 2000. Talið á føddum børnum fyri hvørja kvinnu í aldrinum 15 til 49 ár er tó ymiskt, liggur frá 1,53 á Álandi - sum er miðaltalið í ES, til 2,58 í Føroyum, sum sostatt liggur væl omanfyri miðaltalið í ES.

Umstríddur rithøvundur heiðraður

Tað liggur at kalla í hesum báðum orðunum, at persónur við hesum eginleikum ikki er væl lýddur allastaðni, og tað hevur V. S. Naipaul eisini fingið at sanna ferð eftir ferð. Men hástórur sum hann er, tekur hann sær als ikki tykni av tí.

Avgerðin hjá Nobelnevndini at lata honum ársins bókmentavirðisløn er prógv um, at her er talan um ein rithøvund av teimum bestu - sama hvørjar eginleikar hann annars hevur, og at navn hansara verður standandi í bókmentasøguni.

Men tað mundi hann vita frammanundan.

Heystfundur Sambandsfloksins

verður á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 3. november kl. 10.00.
Øll sambandsfólk eru vælkomin.

Landsnevndin

Avgerðirnar hjá svensku Nobelnevndini um, hvør skal hava ta árligu bókmentavirðislønina, hava ikki altíð verið líka sjálvsagdar. Heldur ikki í ár, nú nevndin valdi at heiðra ein av teimum mest umstríddu rithøvundunum.

Hann eitur Vidiadhar Surajprasad Naipaul, men tað sigur seg næstan sjálvt, at hann vanliga nevnir seg V. S. Naipaul. Hann er borin í heim á vesturindisku oynni Trinidad í 1932. Faðir hansara royndi at lívbjarga sær sum tíðindamaður og rithøvundur, og longu sum ungur gjørdi sonurin av, at hann eisini ætlaði at royna seg við penninum.

Royna seg er ikki tað rætta orðalagið at nýta, tí í bókini »Between Father and Son«, sum V. S. Naipaul gav út í fjør, kemur týðiliga fram, at hann longur sum ungur kendi á sær, at hann fór at gerast ein av teimum stóru høvundunum í heimsbókmentunum.

Avgerðin hjá svensku Nobel-nevndini hevur eina ferð med alla skrivað navnið V. S. Naipaul í bókmentasøguna, hóast hetta minni enn so er tann fyrsti heiðurin, hann hevur fingið. Fyri tríati árum síðani fekk hann Booker-virðislønina, í 1986 T. S. Elliot-virðislønina, og í 1990 fekk hann riddaraslag frá Elizabeth bretadrotning.

Í faðirsins fótasporum

V. S. Naipaul er sum nevnt ættaður av vesturindisku oynni Trinidad. Tað var har, hann vaks upp og sleit sínar barnaskógvar, men tað er í Bretlandi ella rættari sagt í London, at hann hevur fótað sær sum altjóða viðurkendur rithøvundur.

Eftir at hava gingið á lærda háskúlanum í Oxford gjørdi tann tá 21 ára gamli V. S. Naipaul at seta seg niður í London. Hann valdi at ganga í faðirsins fótasporum og royndi seg sum tíðindamann og bókmentaummælara og starvaðist eitt tíðarskeið hjá BBC. Men tá hann fýra ár seinni gav út fyrstu bókina, »The Mystic Masseur«, varð grundvøllurin lagdur undir lívsyrkið sum rithøvundur burturav.

Hendan fyrsta bók hansara varð væl móttikin, men tað var bókin »A House for Mr. Biswas«, sum av álvara vakti ans fyri gávum hansara. Samstundis fór hann at skriva um hjálanda- og tjóðskaparpolitikk, og nógvar av teimum næstu bókum hansara eru ferðafrásagnir frá meiri og minni ókendum fólkasløgum og søgu teirra. Eisini hesar bøkur bera boð um ein framúrskarandi snilling við penninum, men minni enn so øll eru líka fegin um innihaldið, tí V. S. Naipaul er ikki ein vanligur rithøvundur.

Hástórur og niðurlátandi

Tey munnu vera fá, sum vilja hava hesi bæði lýsingarorðini knýtt at sær, men V. S. Naipaul tykist ikki taka sær tykni av, at tað júst eru hesi bæði orðini, ið ofta verða nýtt, tá talan er um at lýsa eginleikar og sinnalag hansara.

Tað eru tey, ið fáa slíkar eginleikar, tá tey av einum ella øðrum avriki hava fingið viðurkenning, men soleiðis er ikki við V. S. Naipaul. Í áðurnevndu bókini »Between Father and Son« sæst, at hann longu sum ungur drongur var hástórur og niðurlátandi.